UTTAN ÚR HEIMI

## Republikanar í iva

Fleiri politikarar í republikanska flokkinum í USA eru farnir at krevja, at USA skal taka sínar hermenn úr Irak, tí alt ov nógvir amerikanskir hermenn eru falnir har.

Um vikuskiftið fór talið á falnum amerikonskum hermonnum í Irak upp um 1.700, og tað er meiri, enn summir floksfelagar hjá George W. Bush, forseta kunnu góðtaka. Ein teirra er Walter Jones. Hann er limur verjunevndini hjá í Umboðsmannatinginum og valdur í statinum North Carolina. Hann heldur, at tað er trupult hjá USA at rættvísgera álopið á Irak, og at nú er stundin komin til at taka hermenninar heimaftur.

Ein annar republikanari, senatorurin Lindsey Graham, segði við sjónvarpið CBS mánadagin, at uppreisturin í Irak heldur fram, og at amerikanska herleiðslan hevur stórliga undirmett mótstøðuna. Bæði Walter Jones og Lindsey Graham siga, at herleiðslan var als ikki fyrireikað uppá, hvat kundi henda í Irak aftan á sjálvt kríggið ímóti Saddam Hussein.

## Pan Fish meiri vert

Norska alifyritøkan Pan Fish er vorðin munandi meiri verd, eftir at tann kendi reiðarin John Fredriksen keypti næstan helmingin av fyritøkuni herfyri. Hann hevur annars boðað frá, at hann ætlar sær eisini at seta pengar í onnur alifeløg.

Pan Fish hevur verið í stórum trupulleikum seinastu árini, men bankarnir hava kortini forðað fyri, at fyritøkan endaði sum trotabúgv. Fyri nøkrum vikum síðani bleiv fyritøkan endurfíggjað, og síðani er virðið á partabrøvunum meiri enn tvífaldað, skrivar Sunnmørsposten.

Tað eru ikki bara partabrøvini í Pan Fish, sum eru meiri verd nú, enn tey hava verið. Eitt nú hækkaði virðið á partabrøvunum í fyritøkuni Fjord Seafood sjey prosent seinasta fríggjadag, og hjá Domstein var hækkingin næstan fimm prosent tann sama dagin.

## Telefon til forsetan

Indonesiski forsetin, Susilo Bambang Yudhoyono, hugsaði seg neyvan nóg væl um, tá hann seinasta leygardag almannakunngjørdi nummarið á sínari fartelefon og bað fólk ringja, um tey høvdu okkurt at kæra seg um.

Hann fekk úr at gera, tí ikki færri ennn 3.000 fólk ringdu til hansara fyri at kæra sína neyð og mangt og hvat. Mong ringdu eisini til telefonfelagið og kærdu seg um, at tey sluppu ikki framat, men tað var ikki so løgið. Tað er heldur ikki greitt, um forsetin yvirhøvur svaraði.

Susilo Bambang Yudhoyono, sum er fyrrverandi generalur, varð valdur til forseta í Indonesia í fjør, og hann hevur lagt stóran dent á at fáa samband við tað vanliga fólkið. Hetta tykist hava eydnast honum, tí herfyri vísti ein kanning, at 92 prosent av teimum spurdu vóru væl nøgd við forsetan.

## Til hús í serbili

Tá norðmenn og sviar seinasta fríggjadag tóku ta nýggju Svinesund-brúnna í nýtslu, leyp ein maður upp á hjálmin á bilinum, sum tær báðar krúnprinsessurnar, Mette Marit og Victoria, vóru í.

Tað eydnaðist vaktarmonnunum at taka mannin niður av bilinum, men svenska trygdartænastan ætlaði í hvussu er at tryggja sær, at einki skuldi henda Victoriu, tá hon kom aftur til Stockholm. Tí hevði trygdartænastan sent ein serbygdan Mercedes E út í Arlanda-floghavnina eftir krúnprinsessuni, tá honm kom heimaftur. Svenskir fjølmiðlar skriva, at hesin bilurin er serliga sterkt bygdur, og at hann harafturat hevur ymsa trygdarútgerð, sum aðrir bilar av hesum slagnum ikki hava.

Kunningarstjórin hjá Mercedes Benz í Svøríki, Sverker Dahl, vil ikki siga annað, enn at bilurin verjir tey ferðandi ímóti nógvum.

# Hann verður ongantíð tann sami aftur

**Tað drúgva rættarmálið ímóti Michael Jackson verður verandi partur av umdømi hansara.**

JACKSON-MÁLIÐ

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Michael Jackson á veg frá rættarhølinum, eftir at nevningarnir høvdu fríkent hann*

Alt var á gosi uttan fyri rættarhølið, tá tað frættist, at nevningarnir høvdu fríkent poppkongin Michael Jackson fyri ákærurnar um kynsliga misnýtslu og fyri at skonkt ungdómi sterkt. Summi grótu, onnur takkaðu hvør øðrum, meðan uppaftur onnur takkaðu nevningunum. Onkur hevði tikið eitt búður við hvítum dúgvum við sær, og tær vórðu sleptar á flog, tá úrslitið kom.

Michael Jackson kundi tískil fara heim til Neverland sum ein fríur maður, men eygleiðarar siga, at rættarmálið verður altíð knýtt at umdømi hansara. Tí verður hann ongantíð tann sami aftur, siga teir.

Maðurin, sum førdi sakina ímóti Michael Jackson, Tom Sneddon, segði aftan á úrskurðin, at endamálið við rættarmálinum var ikki at gera seg inn á Michael Jackson ella umdømi hansara.

-Vit hava bara gjørt tað, sum vit hildu vera rætt, og vit gjørdu okkara besta. Meiri er ikki at siga um tað, segði Tom Sneddon aftan á úrskurðin.

Hetta er annars ikki fyrstu ferð, at Michael Jackson er lagdur undir ónærisliga framferð ímóti børnum og ungum. Í 1994 rindaði hann ávikavist tjúgu og tvær milliónir dollarar í endurgjaldi í tveimum málum um tað sama.

# Sjórænarar gera um seg

**Higartil í ár hava sjórænarar lopið á fimm norsk handilsskip í asiatiskum sjógvi**

SJÓRÁN

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fleiri væntaðu, at flóðaldan í Landssynningsasia annan jóladag hevði gjørt enda á virkseminum hjá sjórænarunum, men so er ikki. Teir fimm mánaðarnar, sum eru farnir av hesum árinum, hava fimm norsk handilsskip verið fyri sjórænarálopi, og tað sama er hent skipum úr fleiri øðrum londum.

Tað er eitt sindur ymiskt, hvussu álvarssom sjórænaraálopini eru. Í fleiri førum sleppa sjórænararnir ætlanini, tá teir síggja, at manningin er á varðhaldi, men í øðrum førum leypa teir á við skotvápnum og knívum. Í fjør doyðu meiri enn 30 sjómenn í slíkum álopum. Tá vórðu meiri enn 350 sjórænaraálop skrásett.

Í seinastuni hava londini í Landssynningsasia lagt størri dent á at fyribyrgja sjóráni. Tann vandamesta farleiðin er Malakka-sundið, sum er ein av lívsæðrunum hjá farmasiglingarvinnuni, tí umleið ein fjórðingur av øllum heimshandlinum gongur tann vegin. Eitt nú fáa japanar 80 prosent av sínari olju ígjøgnum sundið, og tað hevur fingið japonsku myndugleikarnar at herða bardagan ímóti sjórænarunum.

Men trupulleikar eru við at fáa londini at samstarva. Fleiri lond hava boðið sær til at hjálpa til í bardaganum ímóti sjótænarunum, men stjórin i norska reiðarafelagnum, Arild Wegener, sigur við Aftenposten, at Indonesia og Malaysia rokna Malakka-sundið sum teirra sjóøki, og tey vilja tí ikki góðtaka, at onnur lond hava eftirlit við ferðsluni har.